

[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 28 - 10 - 2011

# Statoil funnið olju í Meksikoflógva

Statoil hevur funnið olju á Logan-leiðini í Meksikoflógva, og hetta er fyrstu ferð, at felagið hevur funnið olju á einari leið í flógvanum, har tað sjálvt er operatørur. Helge Lund, aðalstjóri, sigur í einari fráboðan, at enn er ov tíðliga at siga, hvussu stórt fundið er, og um tað kann loysa seg at fara undir framleiðslu har. -Hetta er so ikki nakað nýtt Aldous/Avaldsnes, sigur fíggjarstjórin hjá Statoil, Torgrim Reitan. Aftenbladet skrivar, at út frá upplýsingunum hjá Statoil má metast, at parturin hjá Statoil av fundinum er í hvussu er oman fyri 100 milliónir tunnur. Statoil er operatørur á Logan-leiðini, sum er har suðuri í Meksikoflógva. Dýpið er knappar 2.400 metrar, og síðani í mai hevur boriðskipið «Discoverer Americas» borað har.